# Føroyar betri sum myndir enn orð



*Hesin danski flokkurin hevur farnu vikuna gjørt dagbók við vatnlitsmyndum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Danskur skúlaflokkur, sum hevur verið á vitjan í Føroyum, hevur gjørt øðrvísi dagbók frá ferðini**

VITJAN
*Eyðun Klakstein*

Valið stóð millum Rhodos, Kos ella Føroyar, men hesaferð valdi Thyregod Skole at senda ein 10. flokk norður í kuldan heldur enn suður í hitan.

Seinastu vikuna hevur hesin flokkurin vitja í Føroyum, og á ferðini hava tey gjørt eina øðrvísi dagbók. Dagbókin hevur verið vatnlitsmyndir, og burtur úr ferðini í Føroyum komu eini 125 myndir.

– Vanliga brúka vit orð til at úttrykkja okkum, og tað eru vit eisini best til, men hesaferð valdu vit at gera eina dagbók við myndum heldur enn orðum, sigur Jens Chr. Kristensen, sum er skúlavegleiðari í Thyrregod.

– Eg haldi eisini, at føroyska náttúran er so sterk og vøkur, at tað er meiri spennandi at endurgeva hana í myndum enn orðum. Føroyar eru betri sum myndir enn orð, heldur danski lærarin.

## Tímdu væl

Vatnlitsmyndirnar hjá donsku skúlanæmingunum hava hingið uppi í Norðurlandahúsinum, har fólk hava havt høvi at síggja úrslitið av ferðini í Føroyum.

– Tá næmingar eru í 15 og 16 ára aldrinum tíma teir vanliga ikki at mála, men soleiðis hevur tað als ikki verið í Føroyum. Næmingarnir hava verið sera ídnir, og hóast vit ætlaðu at sláa tveir teir seinastu dagarnar saman til ein mynd, so vildu teir heldur gera eina mynd fyri hvønn dag, sigur Jens Chr. Kristensen.

## Heldur norðureftir

Thyrrogod Skole hevur ofta sent flokkar uttalands, og vanligt hevur verið, at flokkarnir eru farnir suður í sólina. Rhodos og Kos eru vældámd ferðamál, men hesaferð var sólin ikki málið.

– Vit fingu hugskotið um at fara til Føroya hesaferð, og eftir at hava hugsað okkum um, gjørdu vit av, at tað hugskotið skuldi gerast veruleiki í ár. Næmingarnir vóru ikki so heitir fyri hugskotinum at byrja við, men nú teir hava verið her, er støðan broytt. Vit hava havt nógvar góðar løtur her í Føroyum, vit hava verið víða í landinum, og vit hava roynt nógv ymiskt, sigur Jens Chr. Kristensen.




Laaaaannngt vikuskifti í Aberdeen

hósdag til mánadag...ja!




Aberdeen hevur nógv at bjóða tær. Bæði til gaman og álvara. Unna tær eina fríløtu frá gerandisdegnum við einum longum vikuskifti í Aberdeen, har tú tekur tær av løttum. Spáka tær ein túr eftir longu handilsgøtuni Union Street. Vitja tey ymisku søvnini og tað nú so væl umtókta SATROSPHERE, sum er áhugavert fyri bæði børn og vaksin. Stuttleika tær í stuttleikaparkini Cadona´s ella slappa av í the Leisure Centre. Hugna tær við einum góðum bita á einari av teimum mongu fráliku matstovunum. Og gloym ikki at vitja pubbirnar við tí livandi tónleikinum. Ja, Aberdeen hevur sanniliga nógv at bjóða.

Fráferð úr Vágum hósdag kl. 17.30.
Fráferð úr Aberdeen mánadag kl. 09.00 ella kl 19.00.

Ferðaavgjald sum er kr. 474,- kemur afturat prísinum

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo

Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

www.atlantic.fo



NÝFLETT LAMB
sett í hásætið í Restaurant Hafnia

STÓR LESKILIG BUFFET
har m.a. besta úrval úr føroyskum lambsrættum eru at velja ímillum.



Etið so nógv tygum orka av køldum og flógvum rættum og royni okkurt leskiligt omaná -

fyri bert 195,- børn u/ 12 ár ókeypis

Fríggjad. 28. sept., leygard. 29. sept. & sunnud. 30. sept. frá kl. 18.00 - 21.30

Verið vælkomin á Hafnia - biðið um borð á tel 31 32 33 lokal 519

MBM

Hotellið í miðbýnum
Tel 31 32 33

HOTEL HAFNIA

team85




# Løgmaður kann ongan stuðul lova

**Útoyggjarnar klára ikki at sjálvar at fíggja ætlaðu útoyggjaskrivstovuna, men løgmaður kann ikki lova almennan stuðul til skrivstovuna**

ÚTOYGGJAR
*Eyðun Klakstein*



*– Tað er ikki upplagt, at landið skal gjalda fyri eina skrivstovu hjá einum áhugafelagi sum útoyggjafelagnum. Men landið letur stuðul til ymisk áhugafeløg, og tí kann ikki noktast fyri, at landið kann lata stuðul til eina slíka skrivstovu, sigur Anfinn Kallsberg*

Útoyggjarnar kunnu ikki fáa nakað lyfti frá løgmanni um stuðul til eina skrivstovu, sum ætlanin er at seta á stovn.

Útoyggjarnar eru heitar fyri hugskotinum at seta á stovn eina serliga skrivstovu, sum skal taka sær av áhugamálunum hjá útoyggjunum.

Men útoyggjarnar klára ikki sjálvar at fíggja eina slíka skrivstovu, og tí hevur ein av stigtakarunum til nýtt útoyggjafelag nevnt møguleikan, at myndugleikarnir verða við í eini slíkari skrivstovu.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, heldur at útoyggjafelagið er eitt áhugafelag, sum kann líknast saman við so nógv onnur áhugafeløg í landinum, og tí kann landið ikki bara lova teimum pengar.

– Møguleikin er tó at pengar verða játtaðir til eina slíka skrivstovu, men eg dugi í løtuni ikki at meta um, hvørt hetta kann fáast í lag, sigur Anfinn Kallsberg.

## Innan verandi felag

Í øllum førum tykist tað verða greitt, at landið fer ikki beinanvegin at lata stuðul til eina útoyggjaskrivstovu, tí landsstýrið hevur júst biðið løgtingið játta pengar til eitt nýtt starv í miðfyrisitingini, sum er ætlað útoyggjum og økismenning.

Løgmaður heldur, at útoyggjarnar áttu at umhugsa at samstarva innan fyri Kommunufelagið, sum hevur fyrisitingarliga orku.

– Tað er neyvan nøkur loysn at gera eina útoyggjaskrivstovu, sum fer at oysa umsitingina undir í uppskotum, heldur Anfinn Kallsberg.

– Og tað er heldur ikki upplagt, at landið skal gjalda fyri eina skrivstovu hjá einum áhugafelagi sum útoyggjafelagnum. Men landið letur stuðul til ymisk áhugafeløg, og tí kann ikki noktast fyri, at landið kann lata stuðul til eina slíka skrivstovu, sigur løgmaður.

# Klaksvíkingar fáa nýggjan Ågot



*Hetta er frystilínubáturin Urvaag, sum reiðaríið Ågot hevur keypt.*

**Reiðaríið Ågot í Klaksvík hevur keypt nýggjan frystilínubát úr Noregi**

FISKIVINNA
*Eyðun Klakstein*

Í komandi viku kemur nýggjur frystilínubátur til Klaksvíkar. Tað er reiðaríið Ågot, sum hevur keypt nýggjan línubát í Noregi, og báturin varð yvirtikin í Kristiansund í farnu viku.

Nýggi Ågot er bygdur í 1970 og hevur siglt undir navninum Urvaag. Báturin er stívliga 37 metrar langur, og varð høvuðsumvældur í 1995. Báturin fekk tá nýggj manningarrúm og er í sera góðum standi.

Gamli Ågot, sum er frá 1960, verður seldur reiðaríinum hjá Urvaag.

Tað er skipsmeklaravirkið MARETEC á Argjum, sum hevur skipað fyri søluni av hesum báðum skipunum.

Ågot fær nú nakrar smærri ábøtur og verður málaður, men línubáturin skal eftir ætlan koma til Klaksvíkar fyrst í komandi viku.


HEYSTTILBOÐ

Keyp 1 troyggju og fá 1 ókeypis við

Long troyggja
v/ knappum
399,-

Stutt troyggja
v/ knappum
299,-

V-háls troyggja
299,-

Rundan háls troyggja
299,-

ymiskir litir eru í øllum sniðum

Seytjan

Tórshavn
tel. 311305

Klaksvík
tel. 456517